Skúlastýrisfundur 24.10.2023

Møtt vóru: Hjørdis Ryggshamar, Durita Poulsen, Birgir Jørgensen, Rakul Brattaberg, Jonleyg Eyðunsson, Levi Mørk, John Henrik Holm

Skrá:

1. vælkomin - síðan seinast
2. Vetrarferia......hoyringssvar
3. Felags foreldrafundur
4. Telefonpolitikkurin
5. Ymiskt

- Val fak til 8 flokk - Papír er sent út, uttan vegleiðing ella kunning!
- Næmingar við skúlaangist/ikki vilja í skúla - Hvussu verða hesi (og foreldur) loftaði
- Næmingar ið skifta til Vágs Skúla - Hvussu verða hesi (og foreldur) móttikin/kunnað
- Happing - Verður tikið hond um hetta?
- Læru ætlan - Er ein ítøkilig læruætlan fyri allar flokkar?
- Nær koma fundarfrágreiðingar frá skúlastýrisfundum út á heimasíðuna?

Ad. 1

Skúlasjúkrasysturin er byrja. Hon byrjaði í august og hettar fegnast skúlin um. Somuleiðis hevur skúlin fingið nýggja heimasíðu.

Ad.2

Vit tosaðu um fyrimunir og vansar við vetrarfrí. Fólk vóru ymisk á málið um ætlanina hjá Landstýrinum at seta í gildi vetrarferiu frá komandi skúlaár at rokna.

Tó so hildu fleiri at tað var ein fyrimunur at fáa ein steðg í myrkastu tíð. Tó vóru fleiri sum hildu at tað var skeivt at stytta summarferiuna, tí tá var veðrið oftani gott og børn kundi vera úti og spæla. Meðan ein vandi er fyri at børnini sita heima frammanfyri skerm í febr. Tá ætlanin er at hava vetrarferiu.

Ad. 3

Vit avtalaðu at hava felags foreldrafund í februar. Ætlanin er at halda fundin antin 21. ella 28. Febr. Durita tosar við Tóru Petersen, fyrilestrarhaldara.

Ad. 4

Skúlin hevur sett í gildi nýggjan telefonpolitik:.

## TELEFONPOLITIKKUR Í VÁGS SKÚLA

### Meginreglur fyri telefonnýtslu í Vágs Skúla

Í Vágs Skúla leggja vit dent á at venja næmingar við góðan telefonsið og uppaling í einum talgildum heimi. Tað er alment kunnugt, at ov nógv telefonnýtsla ávirkar hugsavnan og arbeiðslag hjá næmingum. Tí hava vit ásett meginreglur viðvíkjandi nýtslu av telefon. Í meginreglum skúlans stendur soleiðis um endamálið við meginreglum í samband við telefonnýtslu:

**Endamál:**

*At telefonir ikki órógva undirvísingina*
*At telefonir ikki gera, at næmingarnir gerast kropsliga óvirknir í fríkorterunum*
*At næmingarnir eru meira saman sosialt í fríkorterunum*
*At áseta, í hvønn mun telefonin kann verða eitt amboð í undirvísingini*
*At tálma happing á netinum*

Við hesum í huga heita vit á næmingar um ikki at hava telefon við í skúla. Hava næmingar telefon við í skúla er mannagongdin tann, at næmingurin leggur telefonina í telefonkassan í eitt skáp í flokshølinum. Telefon skal verða sløkt og bluetooth skal verða sligið frá.

Hetta verður gjørt, tá møtt verður á morgni, og skápið verður læst. Tá skúladagurin er liðugur, fær næmingurin telefonina aftur.

Tað kann sjálvandi koma fyri, at foreldur/avvarðandi hava tørv á at fáa fatur í næmingum skúlans. Í slíkum føri ber til at seta seg í samband við flokslæraran ella:

Skrivstovuna í Vágs Skúla – tlf. 239306
Skúlastjóra, John Henrik Holm, - tlf. 239330

Hetta hevur viðført at næmingar okkara serliga í hádeild leita sær eftir øðrum háttum at vera saman uppá. Hetta hevur viðført eitt ávíst óró í hádeildini. Tann passivitetur, sum telefonin legði yvir felagsskapin er burtur. So hóast meira óro, so er tað stuttligt at síggja næmingarnir vera saman uttan skerm.

Ad. 5

- Nýggja heimasíða skúlans hevur eina víðkaða frágreiðing um hvat krevst av valfakum í framhaldsdeild, tá hugsa verður um framhaldandi lestur. Framyvir fer skúlavegleiðarin at hava eina felags kunning fyri foreldrum og næmingum áðrenn valt verður.
- Skúlin hevur eftirmett hvussu vit fyrihalda okkum tá / um næmingur hevur skúlaaftran ella vísir tekin til ikki at vilja í skúla. Skúlin ásannar at hvørt málið er serskilt og krevur at man setur inn skjótast tilber við tiltøkum fyri at forða at næmingar ikki vilja í skúla.
- Oftani verður nýggjur næmingur innskrivaður við at foreldur venda sær til skúlastjóran, sum bjóðar teimum vælkomin. Formliga innskrivingin verður eisini altíð framd umvegis teldupost. Tá næmingurin kemur í skúla taka lærarar floksins ímóti, umframt at skúlastjórin heilsar uppá.
- Skúlin hevur ársætlan, sum verður gjørt við skúlaársbyrjan á hvørjum árið. Hvør lærari ger eina ársætlan fyri lærugrein teirra í ymisku flokkunum
- Fundarfrágreiðingarnar frá skúlastýrisfundunum verða lagdar á heimasíðuna tá tær eru undirskrivaðar av skúlastýrinum.

D. Poulsen

Durita Poulsen

Rakul Borg Brattaberg

Birgir Jørgensen

Jonleyg Eyðunsson

Levi Mørk

Hjørdis R. Simonsen